## Enn eitt tepurt tap

Talan gjørdist um føroyskt 0-1 tap, tá kvinnulandsliðið í fótbólti í gjár spældi næsta dystin í undan-undankappingini til EM. Dysturin var móti Kasakhstan, og tó at føroyska liðið var sera væl við í dystinum, so eydnaðist tað mótstøðuni at avgera við einasta málinum. Føroyar spæla seinasta dystin í kappingini mikudagin, tá dystur er móti Makedonia. Tað er tó longu nú greitt, at dysturin um oddasessin og víðari luttøku stendur millum Wales og Kasakhstan.

## Tríggir føroyingar til Werder Bremen

Ungir føroyskir fótbóltsspælarar eru javnan til venjingar uttanlands, og í heyst hava fleiri verið avstað.

Nú skulu tríggir ungir mans afturat royna seg í Týsklandi. Tað er Werder Bremen, sum hevur boðið ungu føroyingunum til venjing í eina lítla viku. Føroysku spælararnir fara avstað 26. november og koma aftur fyrst í desember.

Spælararnir eru 16 ára gamli Páll Klettskarð og 14 ára gamli Helgi Samson, sum báðir eru úr KÍ, og 15 ára gamli Heini Vatnsdal úr VB.

Allir tríggir hava gjørt vart við seg á ungdómslandsliðunum hjá FSF, og bæði Páll og Heini hava áður verið til royndarvenjingar uttanlands.

# Klaksvíkingar á odda

**Nú trý umfør eru telvd, eru klaksvíkingar eina sponn framanfyri vestmenningar**

TALV

*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Martin Poulsen hevur fingið eina fína byrjan í liðkappingini. Higar til er úrtøkan 2,5 stig av 3 møguligum*

Kollafjarðar Talvfelag er í stórari kreppu. Torført er hjá Hans Kristian Simonsen og hinum kollfirðingunum at manna tað eina liðið teir hava í FM-liðkappingini. Tá stendur sjálvsagt sera illa til. Fyrst í øldini var KT eitt hitt fólkaríkasta talvfelagið í landinum við umboðan í øllum deildunum.

Tá vestmenningar komu á vitjan í Kollafirði leygardagin manglaðu heimaliðið mannin á 4. borði. Sjúrður Thorsteinsson - sum saman við John Rødgaard var komin úr Suðuroy - vann tískil talvið uttan at flyta ein leik.

Hans Kristian leikti somikið væl byrjanarspælið við svarta fólkinum, at John Rødgaard sá seg ikki føran fyri at fáa nakran serliga fyrimun. Teir samdust um ein skjótan javnleik. Jákup á Rógvi Andreasen vann á 3. borði trygt á Árant Djurhuus.

Longsta talvið varð millum Eyðálvur Johannesen og Carl Eli Nolsøe Samuelsen. Seinast nevndi hevði lítlan fyrimun í miðspælinum, men eitt mistak viðførdi, at Eyðálvur fekk betri støðu. Støðan tyktist tó at vera í javnvág, tá teir samdust um javnleik í fjórða tímanum.

Vestmenningar hava nú 8 stig, meðan kollfirðingtar hava -1 stig. Orsøkin til minusstigið er, at stig verða tikið frá liði, sum ikki megnar at møta fullmannað til dyst.

### Sandavágsmenn høvdu møguleikar

Klaksvík 1 vann á heimavølli stórsigur 3,5-0,5 á sandavágsmonnum. Hugdu tú at støðunum á talvborðunum hálvan tíma undan seinasta talvið var liðugt, hevði tú ikki væntað slíkan stórsigur. Eitt nú hevði Bernhard Augustinussen vinnandi støðu ímóti Finnbjørn Vang, og javnvág var í talvinum millum unga evnaríka Rógva E. Nielsen og Ólavur Simonsen.

Men við eitt varð vent í holuni. Bernhard misti sín riddara á miðjum borði, og Rógvi yvirspældi sína støðu. 2-0 til KTF. Og stutt aftan á vann Steintór Rasmussen á Torkili Nielsen. Steintór telvaði sera optimistiskt og væl.

Olaf Berg, sum nú telvar við ST, og Heini Olsen leiktu ein áhugaverdan javnleik á 1. borði. Klaksvíkingar tykjast væl fyri í ár, og torført verður ivaleyst hjá verandi føroyameistarunum úr Vestmanna at endurtaka flotta FM-sigurin. KTF 1 og KT hittast í 4. umfari. ST og KTF 2 verður ein spennandi og opin dystur.

### Styrkt havnarlið vann stórsigur

Havnarmenn hava styrkt sær liðið við hvalvíkingunum Finnbjørn Zachariassen og Martin Brekká. Klaksvík 2 fekk einans hálvt stig norður við til Klaksvíkar aftur.

Martin Poulsen hevur fingið eina góða kappingarbyrjan við 2,5 stigum av 3 møguligum. Hann vann uppgerðina á 1. borði ímóti Terja Petersen.

Við sigrinum hava havnarmenn 6,5 stig og nærkast nú toppinum. Megna teir støðugt at hava somu manning, kunnu teir saktans fáa oddaliðini aftur. Komandi leygardag hava havnarmenn møguleika at ota seg enn longur fram, tá ið teir vitja í Vestmanna.

Klaksvík 2 er framvegis væl fyri við sínum 5,5 stigum.

### 2. deild

Vestmenningar hava tvey lið í 2. deild, og sigast má, at munur er á liðunum. Tað eina er nevniliga fremst, meðan hitt er aftast. Havnin 3, Sandavágur og Havnin 2 fylgja tó væl við oddaliðnum.

Sandavágur er fremst í unglingadeildini, meðan Klaksvík 3 hevur leiðsluna í 3. deild.

**Atlantic Airways-kappingin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 6 | 4 | - | 1 | - | 1 | 172 | 159 | 13 |
| 2 StÍF | 6 | 3 | - | 3 | - | 0 | 167 | 164 | 3 |
| 3 Neistin | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 197 | 172 | 25 |
| 4 KÍF | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 158 | 163 | -5 |
| 5 H71 | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 162 | 177 | -15 |
| 6 Kyndil | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 163 | 184 | -21 |

**Talvúrslit og –støður**

**1. deild**

| | |
|---|---|
| Kollafjørður - Vestmanna | 0-3 |
| Klaksvík 1 - Sandavágur | 3,5-0,5 |
| Havnin – Klaksvík 2 | 3,5-0,5 |

**Støðan**

| | |
|---|---|
| 1 Klaksvík 1 | 8,5 |
| 2 Vestmanna | 8,0 |
| 3 Havnin | 6,5 |
| 4 Klaksvík 2 | 5,5 |
| 5 Sandavágur | 3,5 |
| 6 KT | -1,0 |

## Talvið hesa vikuna

Steintór Rasmussen (2121) – Torkil Nielsen (2046)
1. deild KTF-ST (18.11.06)

1.d4 f5 2.Ric3 d5 3.g4 (Ja, ger so væl Torkil! Steintór tykist at vilja sleppa út teoriini og harvið skapa óbalansu í støðu Torkils. Áhugavert finnuoffur) 3...fxg4 4.Bg2 Rif6 5.Bg5 c6 6.Fd3 g6 7.h3! (Steintór vil leika f3-e4, og tískil má g-finnan vekk av vegnum) 7...Bf5 8.Fe3 Ribd7 9.0–0–0 Fa5 10.hxg4 Rixg4 11.Fg3 Rigf6 (Torkil hevur eins og Steintór telvað byrjanarspælið væl) 12.Kb1 0–0–0 13.f3 Bg7 14.e4 dxe4 15.fxe4 Be6 16.Bd2! (Lúmskur leikur. Torkil hoppar í felluna)



16...Rih5?
Støðumynd aftan á 16…Rih5

17.Rxh5! Fxh5 18.Bf3 (Svarta frúgvin hevur bert eitt stað at fara, á a5, men so hevur hvítur Rid5! og tað verður mát á e7 ella c7) 18...Be5 (...tískil má Torkil lata bispin) 19.dxe5 Fxe5 20.Bf4 Fa5 21.Rige2 Bf7 22.Bg4! e6 23.Rid4 Ric5 24.Bd6 h5 25.Bh3 Rxd6 (Panikkur. Men svartur hevur tapta støðu. Hvítu brikkarnir samvirka sera væl) 26.Fxd6 Rd8 27.Fe7 Rd7 28.Ff8+ Fd8 29.Fxc5 (Torkil kundi havt givið upp, men hann treiskast nakrir leikir aftrat) 29...Fh4 30.Ff8+ Kc7 31.Ridb5+ (Steintór var veruliga í hopla hendan dagin. Taktiska snildið bilar als ikki) 31...cxb5 32.Rxd7+ Kxd7 33.Fxf7+ Kd8 34.Ff1 Ke7 35.Rixb5 g5 36.e5 g4 37.Bg2 a6 38.Rid6 1-0